**Tit ringja — vit skriva**

Er nakað á vási? — Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara.
Vit eru til reiðar!
**Telefon 11820 · Telefax 14720**

tíðindablaðið **sosialurin**

**Lýsingar**

Lýsingarfólk okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingarspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran
**Telefon 11820 · Telefax 14720**

## veðrið

Lágtrýstið, undir 980 hpa, undir Jan Mayen rekur í landnyrðing. Vit fáa kølið luftrák við ælingi og regni vestaneftir.

### Týsdagin



At byrja við frískt lot upp í hvassan vind, 10–15 m/s, av útsynningi og vestri. Út á seinnapartin minkandi og hækkandi til útnyrðing, ádrigið, ælingur, nakað skiftandi, tó toluligt sýni. Hitin millum 4 og 8 stig. Mikunáttina frískt lot upp í hvassan vind, 10–15 m/s, av útsynningi, ádrigið, regn og vánaligari sýni.

### Mikudagin & hósdagin

Frískt lot upp í hvassan vind, 10–15 m/s, av vestri og útsynningi, ádrigið, stundum regn, annars toluligt sýni. Hitin uml. 10 stig.

### Fríggjadagin & leygardagin

Gul upp í strúk í vindi, 7–12 m/s, av útnyrðingi og norði, lutvíst ádrigið, okkurt ælið, annars toluligt ella gott sýni. Hitin millum 3 og 6 stig.

## óli teknar

© 1994 Sosialurin/Óli Petersen

### *Oljudreymar*




Oljan í føroysku undirgrundini ger, at vit kunnu sova róliga í 10–15 ár afturat

*Nú er Andrass Dunna skýrdur á føroyskum:*

# Hann eitur Dúnaldur

Mikudagin klokkan 14.00 fer Andrass Dunna, Anders Ands ella Dunnu-Dánjal sum hann eisini hevur verið nevndur í søguna. Hesin kendi steggi hevur nú fingið føroyskt navn og mikudagurin er almenni skýrnaðardagurin. Hetta hendir á eini samkomu í hølunum hjá Føroya Lærarafelag. Sosialurin kann longu nú næstan við 100 prosent vissu avdúka føroyska navnið á Anders And og unnustu hansara í løtum, Andersinu.

Vit hava frá álítandi keldum fingið at vita at Anders skal eita Dúnaldur og Andersina Dúnhildur. Hvussu øll hini í Dunnuvík verða kallaði á føroyskum verður ikki avdúkað fyrrenn í fríggjadagsblaðnum.

Teknirøðin um Dúnald, Dúnhildur og øll hini verður ú týdd til føroyskt og tað gleða børn og vaksin seg til.

jústinus



FLOGFERÐA-SEÐLAR
Atlantic Airways
SAS
DANAIR
ICELANDAIR
TLF. 15900
-títt ferðasamband við útheimin!

SJÓNVARPSTÆNASTA
RADIOTÆNASTA
ANTENNUARBEIÐI
Vit gera alt og selja mangt. Altíð góð tilboð. Skjót og góð avgreiðsla.
RADIOHANDILIN
v/ E. & P. Persson p/f
N. Finsens-gøta 16 Tlf. 18277

GOTT SKORA-KJØT úr MYKINESI
til sølu.
Eisini fáast góðar GULAR MAJ-RØTUR
ÚTISTOVA - Tlf. 10988

á BLÁDÝPI
gistirtú væl & bíliga.
Eisini hava vit serligar vetrar- & vikuskiftis-prísir.
BLÁDÝPI
Dr. Jakobsensgøta 14-16
Tlf. 11951 Fax. 19451

## Vestfalskyrrindi

5. oktober: Tendring
6. oktober: Mánin næstur jørðini
10. oktober: Fyrra kvarter

| Dato | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | Haraldssundi/Leirviksfirði fp. | sp. | Skúvoyarfirði/Skopunarfirði fp. | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. okt. | 1147 | – | 0107 | 1347 | 1002 | 2243 | – | 1202 | 1047 | 2328 | 1102 | 2343 |
| 12. okt. | 0028 | 1307 | 0228 | 1507 | 1122 | – | 0043 | 1322 | – | 1207 | – | 1222 |